## United vil hava Suarez

Enska blaðið The Times vil vera við, at Manchester United ætlar sær at keypa stóru stjørnuna hjá Ajax í Hollandi. Álopsspælarin Luis Suarez hevur rættiliga gjørt vart við seg í hollendskum fótbólti, og United skal verða sinnað at keypa spælaran á nýggjárinum. Prísurin verður eftir øllum at døma millum 200 og 300 milliónir krónur. Luis Suarez er 22 ára gamal og hevur skotið 54 mál í 75 dystum fyri Ajax.



## Giggs vil verða landsliðsvenjari

Mest vinnandi fótbóltsspælarin í bretskum fótbólti, Ryan Giggs, er hugaður at gera landsliðsvenjari í Wales, tá ið hann gevst at spæla fótbólt. Giggs fyllir 36 ár í november, so yrkisleiðin sum spælari syngur síðsta vers. – Tá tú hevur spælt á landsliðnum og gevst at spæla, so er landsliðsvenjarastarvið tað største, sum tú kannst uppnáa, sigur Ryan Giggs. Hann sigur, at børn og ung í Wales eiga í størri mun at velja fótbólt heldur enn rugby sum ítróttargrein.

### Dráttur-SÍ 0-3 (12-15, 20-25, 22-25)

# SÍ stormar avstað

**Samstundis sum SÍ vinnur sínar dystir, megna einki av næstu liðunum at fáa ferðina upp og fylgja við**




Hilmar Jan Hansen



Sí-kvinnurnar eru einaráðandi í løtuni, og einki røkist fyri, at tær í bræði fáa veruliga kapping frá nøkrum av hinum liðunum
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Lagt var upp til eina vágauppgerð, tá Dráttur í gjár á Giljanesi tók ímóti SÍ, men talan gjørdist ongantíð um tann spennandi dystin, mong óivað høvdu ynskt sær. Til tað vóru SÍ-kvinnurnar alt ov góðar, hóast tær mangan hava spælt betur, enn tær gjørdu hesa ferð.

Dráttur hevur mist nógv fólk, og tað bæði sæst og merkist, og tí bleiv dysturin í gjár á ongan hátt endurtøka av teimum spennandi dystunum millum liðini í fjør, sum allir vóru fimmsettarar, ið SÍ tó vann 3-2 hvørja ferð.

Í fyrsta setti vísti SÍ besta spælið í dystinum, men síðani linkaði trýstið, uttan at Dráttur tó av álvara fekk hótt sigurin. Í øðrum setti var munurin tó ikki so stórur, og í triðja setti fekk Dráttur góða byrjan við 6-1 leiðslu, men SÍ javnaði seinni til 13-13, og so fylgdust liðini uppeftir, til SÍ at enda fekk avgjørt til egnan fyrimun.

Sigurin merkir, at SÍ nú er fýra stig framman fyri næstu liðini, harav onkur tó hava spælt ein dyst færri. Kortini sær ikki út til, at nakað av næstu liðunum megnar at seta ferðina upp og fylgja við SÍ, ið higartil – enntá hóast feilir og sløsut spæl til tíðir – koyrir mestsum fyri seg.

Hini hava tó onkra gularót eftir, tí seinni verða stigini koyrd niður í helvt, og eftir lokna landskapping skal meistaraheitið avgerast millum tvey tey fremstu við finalum. Enn røkist einki fyri, at SÍ fær veruliga kapping, men tað kann sjálvandi broytast, sum tað líður út á kappingarárið.

### TB-Mjølnir 2-3 (10-25, 25-23, 26-24, 21-25, 11-15)

# Fimm sett máttu til

**Fyri viku síðani vann TB eitt sett frá Fleyr og hesa ferð eydnaðist at taka tvey sett frá Mjølnir, sum tó hevði munin**




Hilmar Jan Hansen

Mjølnir var púra fyri ongum, tá liðið fyri viku síðani vitjaði í Sørvági, men nú enn ein útidystur var á skránni leygardagin, sá betri út. Tað eydnaðist at vinna á TB í Trongisvági, men sigurin varð ikki fingin til høldar uttan svørðsslag.

Í fyrsta setti sat Mjølnir á øllum, men longu í øðrum setti vendi TB dystinum og helt fram í triðja setti. Tá var Mjølnir á odda 24-16 og manglaði bara settbóltin, áðrenn TB raknaði við og enntá tók settið við 26-24!

At TB hevur fingið Gudrid Nolsøe aftur, er stórur styrkur, og hon lyftir eisini hinar upp við sær. Tað var eisini um reppið, at tað í fjórða setti bar heilt á mál, men best sum TB var komið í gongd, byrjaði spælið hjá Mjølnir eisini at batna í stórum, og tað eydnaðist at vinna settið og yvirliva.

Í fimta og avgerandi settinum var heldur ikki stórur munur á, men Mjølnir royndist drúgvari og fór avstað við sigrinum í einum væl spældum dysti, har serliga servurnar hjá báðum pørtum gjørdu, at liðið hinu megin netið ikki kundi loyva sær at taka sær av løttum.

### KÍF-ÍF 0-3 (15-25, 6-25, 13-25)

# Einvegis ferðsla

Seinnapartin í gjár var Ítróttarhøllin í Kollafirði karmur um absolutta botndystin hetta umfarið, tá KÍF tók ímóti ÍF. Undan dystinum hevði hvørki liðið vunnið nakran dyst, tíansheldur nakað sett, so her ráddi um at royna at sleppa úr botninum.

Men hóast fortreytirnar ikki vóru ólíkar, tá hugt var at stigatalvuni undan dystinum, so var á vøllinum eingin sum helst ivi um, at ÍF var klárt betra liðið, og í veruleikanum var talan um einvegis ferðslu allan vegin.

KÍF fekk slett ikki hótt ÍF, sum serliga í øðrum setti demonstreraði munin á liðunum og annars í løtum vísti spæl, ið gevur vón um, at liðið ikki bara fer at vinna fjórðahvønn dyst í vetur. Verri sær út hjá KÍF, sum í løtuni er besta boðið upp á botnproppin í Eikliguni hjá kvinnum.

**hil**